# Tey byggja aftur á Langasandi

**Fyri fyrstu ferð síðan einaferð í áttatiárunum verða hús bygd á Langasandi. Ein útstykking, sum umfatar 13 grundstykki, er gjørd, og fyrsta húsið er komið upp at standa**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Langasandi:** Haldarsvíkar Kommuna stykkjar út á Langasandi. 13 grundstykki eru í ætlanini, og fyrsta húsið er reist.

Poul Grunnveit, borgarstjóri í Haldarvíkar Kommunu, sigur, at seinasta húsið varð bygt á Langasandi einaferð í áttatiárunum.

Haldarsvíkar Komuna gjørdi eina útstykking fyri nøkrum árum síðan, men har varð ongantíð nakað bygt, sigur borgarstjórin.

Útstykkingin, sum nú verður bygt á, er eitt sindur víðkað, sigur Poul Grunnveit. Orsøkin er, sigur hann, at tann, sum nú hevur reist, vildi sleppa at byggja á ávísum stað, sum tá ikki var umfatað av útstykkingini.

Umframt tað húsið, sum í dag er reist, er eitt stykkið planerað, eitt er grivið út, umframt eitt, sum er umbiðið.

Umframt sethúsabygg-ingina verður eisini eitt spælipláss gjørt á økinum, sigur borgarstjórin.

Tríggjar bygdir eru í Haldarvsíkar Kommunu. Haldarsvík, Tjørnuvík og Langasandur. Umframt útstykkingina á Langasandi, eru eini fimm grundstykki tøk í Haldarsvík, sigur borgarstjórin

Í Tjørnuvík er einki grundstykki tøkt í løtuni. Men áhugi tykist vera, og arbeitt verður við einihvørji loysn, sigur Poul Grunnveit, borgarstjóri.

Trupulleikin í Tjørnuvík er tann, sigur hann, at har er so lítið byggilendi. Tað, sum er, er góður bøur, og teir hava líkasum hildið seg eitt sindur aftur við at taka tann góða bøin til byggilendi.

Poul Grunnveit, borgarstjóri í Haldarsvíkar Kommunu, sigur, at nýggj byggisamtykt er ávegis í Haldarsvík. Væntandi fer hon at verða klár og framløgd í ár. Eitt øki verður lagt av til sethúsabygging oman fyri bygdina í Vík, sigur hann.



*Fyri fystu ferð í eini 20 ár verður bygt á Langasandi. Av 13 grundstykkjum eru framvegis níggju tøk, sigur bygdarráðsformaðurin*
*Mynd: Edvard Joensen*

Annars hevur Haldarsvíkar Kommuna loyst skúlatrupulleikan, sum kommunan, eins og flest allar kommunur í landinum, kom í av nýggju fólkaskúlalógini.

Haldarsvíkar Kommuna keypti húsini á Bø til skúlabrúks. Poul Grunnveit sigur, at saman við gamla skúlanum í Vík nøkta tey húsini nú tørvin. sum er.

Í gamla skúla eru tvær skúlastovur, meðan eins skúlastova umframt serstovur eru á Bø. Í miðhæddini eru ein vanlig skúlastova og ein teldustova, meðan smíðstova og ein stova til natúr og tøkni er í kjallaranum. Tað ganga umleið 25 børn úr Haldarsvík og av Langasandi í Skúla í Vík, og tríggir lærarar eru. Ein er tó í hálvtíðarstarvi.

Í Tjørnuvík er eisini skúli, har eini fimm børn ganga hjá einum lærara, upplýsir borgarstjórin.

Poul Grunnveit sigur, at tá farið varð í skúla á Bø, stóðu húsini kommununi í umleið 800.000,- til 900.000,- krónum við keypi og innrætting.

Úr Føroyahúsinum í Keypmannahavn:

# Politikkur og list

**Valið er av og samgongan fingin í lag. Men hvør verður polititikkur teirra? Eisini er stóra verkætlanin Nordatlantisk Kulturfestival komin upp undir land og lagt verður fyri fríggjadagin 17. mei við fernisering.**

TÍÐINDASKRIV

Pallborðsfundur um framtíð Føroya. Týskvøldið 14. mei verður pallborðsfundur kl. 19 ella beint eftir døgverðan hetta kvøldið, sum er ræstur fiskur við garnatálg. Hesu ferð sita fólk við pallborðið, sum hava verið uppi í orðaskiftinum og havt sína hugsan um politisku viðurskiftini heima. Sjúrður Skaale, Virgar Dalsgaard og Flóvin Eidesgaard. Sjúrður er væl kendur í politikki heima, serstakliga við blaðnum Fregnir. Eisini er hann skrivari hjá Torbjørn Jacobsen. Virgar er lærari og hevur í mong ár fylgt við og verið uppi í orðaskiftinum um føroyskan politikk. Javnaðarmaður um ein háls og er á sambandsvonginum. Flóvin er ungur maður og væl kendur millum lesandi fólki. Hann er eisini javnaðarmaður, men á sjálvsstýrisvonginum.

Ætlanin er at fáa eina mynd av politisku støðuni, nú løgtingsvalið er av. Eitt er hvør skipar samgongu - tað vita vit nú - og eitt er mið og mál teirra. Men hvørji mál er átroðkandi at fáa loyst og hvussu eru búskaparligu útlitini? Er nýggja samgongan brynjað at taka upp á seg at loysa málini og laga búskaparligu gongdina, so at sum frægast fæst burturúr? Og sjálvandi skal tátturin um ríkisfelagsskapin takast upp, men eisini spurningurin um Føroyar og EU. Stórur partur av ríkinum er uppi í EU.

Áhugin millum føroyingar niðri fyri politikki og gongdini heima er góður. Tó munna mong kenna seg vera áskoðarar til ein leik, sum tey ikki kunna vera við í, tí tey hava valt at vera útisetar. Men lat tað so vera sagt, at hjá mongum hevur einki verið at valt ímillum, tí fóru tey heiman.

Gott og væl hálvtannaðhundrað fólk vóru samankomin til valfuundin fyri valið. Fundurin var góður, men heldur linligur. Valkvøldið komu minst líka nógv fólk inn á gólvið at lurta eftir valsendingum og hugna sær nakrar tímar.

### Stóra mentanrtiltakið úr barkastokki

Í eitt ár hava tey trý mentanarhúsini í Keypmannahavn: Jónshús, Grønlendska Húsið og Føroyahúsið, fyrireika eina mentanarstevnu, sum verður 23. til 26. mei. Hetta hevur verið sagt frá í bløðunum og eisini í útvarpinum. Nú er skráin komin út og heimasíðan mest sum fullfíggjað. Hon eitur www.nordatlant.dk. Har finnur ein skránna og alt tað, sum hendir her á leið um tað mundið.

Av føroyskum tilfari skal serstakliga nevnast:

Kabarett, sum Eyðun Jóhannesen skipar fyri 23. mei við fimm føroyskum sjónleikarum,

Vísusangur og føroyskur dansur við Hanus Jóhansen og Fótatraðk. Klassiksur sangur við Ernst Dalsgarð.

Kórsangur við Húsakórinum, Mpiri kórinum og Kallakórinum Lítla

Bókmentakvøld við Jógvan Isaksen og Hanusi kamban

Føroyskt bátasmíð við Hanus Jensen, handverk við Henning Thomsen og Nicolinu Beder. Bátaróður við Tvørábátinum og tveimum bátum úr Neystinum. Postverkið hevur stóra frímerkjaframsýning

Listin er longri enn so, men verður tað ov drúgført her. Vón okkara er at fólk bæði landsmenn og danir hyggja framvið og fáa eitt sindur burtur úr hesum stóra tiltaki.

### Listaframsýning á Bryggen - Norðurbryggjuni

Hóast bygningurin ikki er liðugur, men enn stendur tómur, er hann væl egnaður til framsýningar. Longu fríggjadagin 17. mei kl. 16 letur listaframsýningin hjá mentanarstevnuni upp harúti, Strandgade 100 C. Føroysku listafólkini eru Amariel Norðoy, Vígdis Petersen og Hanne Bjartalíð. Harafturat eru trý íslendsk og tvey grønlendsk listafólk við. Undir ferniseringini verðu leskiligur pinnamatur, tónleikur og røða.

Øll eru væl komin til bæði ferniseringina fríggjadagin 17. mei og til fyrilesturin um føroyska, íslendska og grønlendska list, sum verður á Bryggen týskvøldið 21. mei kl. 19. Tá fer vegna føroyska partin Kinna Poulsen listsøgukvinna at greiða frá. Hetta kvøldið syngur bæði okkara stóra Húsakór og vísusangarin Stanley Samuelsen harúti.

Hósdagin 23. mei kl. 16 verður mentanarstevnan sett á Kongens Nytorv við kórsangi, trummudansi og føroyskum dansi. Vígdis Finnbogadóttir fer at røða. Av torginum verður dansað og kvøðið oman í Huset í Magsstræde, Rådhusstræde 13, til reseptiónina. Har stendur Hansu Jensen longu og smíðar eitt fýramannafar og á 1. hædd er frímerkja-framsýningin. Nikolina Beder og Henning Thomsen farin til verka. Føroyskt øl fæst við diskin og uppi í matstovuni fara tey m. a. at hava kjálkafisk og kalva á matkortinum.

Dyrnar eru opnar. Væl komin innar.



# *Ung stjørnuskot* á Danmarkarferð



TÍÐINDASKRIV

Glað, móð og full av upplivingum komu fyri stuttum 44 børn í land av Norrønu. Bólkurin *Ung Stjørnuskot* er heimaftur komin eftir eina á allan hátt væleydnaða konsertferð til Danmarkar.

*Ung stjørnuskot* er eitt rúmtiskt kór og orkestur, sum hoyrir til Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla og Tórshavnar Musikkskúla. Tey hava tey seinastu tvey árini javnan havt framførslur m.a. í Norðurlandahúsinum, tá ið jólatræið í Havn varð tendrað, á kvøldskúlaframsýningum, í SMS, á jazzfestivalinum og í Sjónvarpi Føroya. Eisini vunnu tey POP-TOP kappingina í Grasagarði ár 2001. Fýra tónleikalærarar – Sigrið Sivertsen, Bo Isholm, Jónleif Jensen og Katja Volovelskaja – eru knýttir at Ungum Stjørnuskotum.

Túrurin gekk fyrst til Sønderrisskolen í Esbjert, har tær donsku vertsfamiljurnar og fyrireikararnir bjóðaðu vælkomin. *Sønderrisskolens Kor* og *Esbjerg Kulturskoles Ungdomsymfoniorkester* vitjaðu í Føroyum í fjør summar, og høvdu sum tøkk fyri tað gestablídni, teimum var víst í Føroyum, boðið Ungum Stjørnuskotum á vitjan í Esbjerg.

Tey musikalsku hæddarpunktini á ferðini vóru konsertirnar í Legolandi, í Esbjerg Musikhús, á Sønderris-skúlanum og Sønderho Kirke á Fanø. Har høvdu Ung Stjørnuskot sera væleydnaðar framførslur við eini skrá, ið røkkur frá Beatles, Backstreet Boys og Celine Dion til føroyskar sangir og amerikanskar gospel-sang ir.

Ágóðin av einum slíkum túri er ómetaligur. Umframt ta musikalsku menningina, sum týðiliga merkist hjá bæði sangarum og tónleikarum, verða nýggj vinabond knýtt til javnaldrar og familjur í Danmark. Sínámillum eru børnini komin hvørjum øðrum nærri, og teirra sjálvsálit er eisini økt við at uppliva, at tað, sum tey duga, verður virðismett av øðrum.

Uttan hjálp frá einum stórum og virknum bólki av foreldrum og stuðli frá fleiri almennum og privatum sponsorum hevði henda ferðin neyvan verið gjørlig. Stóra tøkk, øll tit, sum hava hjálpt til við at gjøgnumføra hetta tiltakið.

Konsertin *»Ung Stjørnuskot á ferð 2002«* kann upplivast eina ferð enn **mikudagin 15. mai kl. 19.00 í Kommunuskúlaskálanum** (auluni). Ókeypis atgongd.





